## Útnorðurráð nýggjan formann



Á fundi í Nuuk hevur Útnorðurráðið valt íslendska altingsmannin Karl V. Matthíasson til formann í ráðnum eftir grønlendska landstingsformannin Jonathan Motzfeldt. Hann heldur tó fram í formansskapinum saman við Henrik Old, løgtingsmanni og nýggja formanninum. Í sínari fyrstu røðu sum formaður legði Karl V. Matthíasson millum annað dent á, at londini í útnorði eiga at menna samstarvið innan javnrættindi, fiskirannsóknir og bjarging. Karl V. Matthíasson, sum í sínum borgarliga starvi er prestur, er altingsmaður hjá Samfylkingini.

## Skipamyndir í Snarskivuni

Tórshavnar Býarsavn letur í morgin klokkan 16 upp myndaframsýning í Snarskivuni á Vaglinum. Á framsýningini, ið Finnur Johansen hevur lagt til rættis, eru umleið 25 svartar-hvítar myndir av fiskiskipum, sum í tríatiárunum landa við eystaru bryggju í Havn. Fyri 100 árum síðani var Tórshavn størsta fiskivinnuplássið í Føroyum, og í fyrru helvt av tjúgundu øld vóru Tórshavn, Tvøroyri og Vágur størstu fiskivinnuplássini í landinum. Í tríatiárunum gjørdist eisini Klaksvík eitt av stóru fiskivinnuplássunum. Framsýningin er opin allar gerandisdagar.

# Vánalig loysn fyri Atlantsflog

**- Talan er einans um at ganga einum ynski frá Bristow á møti um at seta ein sonevndan ADEL-sendara í gomlu tyrluna. Tað er stutt sagt ein vánalig forrætning fyri okkum at brúka LOB-tyrluna í Onglandi, sigur Magni Arge, stjóri**

TILBÚGVING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Stormur í einum vatnglasi!

Soleiðis taka danir stundum til, og soleiðis lýsir Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, øsingina um tyrlumálið, sum hevur tikið seg upp í fjølmiðlunum.

- Tað er einki hald í, at Bristow hevur kravt, at vit nýta nýggju tyrluna í flúgvingini í Onglandi. Tað einasta, málið snýr seg um, er, at teir hava sett eitt krav fram um, at vit seta ein sonevndan ADEL-transpondara í gomlu tyrluna. Og tað hava vit eftirlíka, sigur Magni Arge.

Nakað annað er so, at tað hevur tikið langa tíð at fáa neyðugu góðkenningina at seta hendan sendaran í gomlu tyrluna. Gingið var bara út frá, at hetta var ein avgreiðsluspurningur, men tað vísti tað seg ikki at vera, og tí er so long tíð gingin.

- Gamla tyrlan hevur alla tíðina verið nýtt í avtaluni við Bristow, og tað hevur als eingin trupulleiki verið í tí. Vit sendu nýggju Leiting og Bjarging (LOB)-tyrluna til Onglands, meðan hesin sendarin varð settur í gomlu tyrluna, og tað er avgjørt ikki tí, at hetta er nøkur góð forrætning fyri okkum, tvørturímóti, sigur stjórin á Atlantsflog.

Magni Arge vísir á, at fyri tað fyrsta er gamla tyrlan bíligari í drift enn tann nýggja, og hartil kemur, at væl styttri er millum kravdu eftirlitini hjá nýggju tyrluni. Tað merkir, at meiri nýggja tyrlan flýgur, styttri tíð gongur millum dýru eftirlitini, so tað er avgjørt í teirra áhuga, at gamla tyrlan røkir sáttmálan við enska felagið.

### Eingin ónøgd

Stjórin á Atlantsflog sigur, at hann als ikki hevur merkt nakra sum helst ónøgd um sáttmálan, hvørki frá Fiskimálaráðnum ella frá Tilbúgvingarstovuni. Tvørtur ímóti hevur hann ta greiðu kenslu av, at allir partar eru vælnøgdir.

- Eg hevði fund við tilbúgvingina so seint sum í vikuni, og har kom als einki fram um nakra ónøgd, tvørturímóti. Øll tykjast fegin um samstarvið, sigur Magni Arge.

Hann heldur tað verða bæði óheppi og synd, at tey fólk, sum stríðast nátt og dag fyri at halda tilbúgvingini til reiðar, soleiðis skulu koma undir illgruna fyri at vera partar í eini spekulatión.

At enda sigur Magni Arge, at teir valdu hesa loysnina, tí summar er og ljóst í veðrinum, og tí er ikki brúk fyri teirri serligu útgerð, sum nýggja LOB-tyrlan er útstýrd við.

Vit royndu at fáa eina viðmerking frá stjóranum fyri tilbúgvingini, Anni á Hædd, men tað eydnaðist ikki at fáa fatur á henni fyri evstamark blaðsins.



*Tyrlumálið hevur einki upp á seg og er bara blást upp í fjølmiðlunum, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog*

# Vinnuhúsið fegnast

**Síðst í farnu viku vóru broytingarnar í útlendingalógini sendar til hoyringar. Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um, at tað endiliga hendir nakað á økinum. Men broytingarnar fáa ikki virkna fyrr enn 1. januar**

ARBEIÐSMEGI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Í Vinnuhúsinum fegnast tey um, at tað endiliga hendir nakað við spurninginum um útlendska arbeiðsmegi í Føroyum*

Vinnuhúsið fræftir dag og dagliga frá fyritøkum, sum mangla arbeiðsmegi, og tað er ein støða, sum á ongan hátt er nýggj.

- Seinastu tvey árini hevur áhaldandi verið mangul uppá fólk. Arbeiðsgevarafelagið hevur tí leypandi roynt at kunna myndugleikarnar um støðuna og víst á, at neyðugt er at opna okkara arbeiðsmarknað, sigur Vinnuhúsið.

Teir fegnast tí um, at tað nú endiliga sær út til, at ein glotti er fyri framman. Sambært lógaruppskoti hjá Innlendismálaráðnum um broytingarnar í útlendingalógini, sum nú er sent til hoyringar, fáa allir ES borgarar atgongd til føroyska arbeiðsmarknaðin frá 1. januar 2008.

- Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um, at tað endiliga hendir nakað á økinum. Sjálvt um miðlarnir í grannalondunum hava víst á, at arbeiðsmegin í nýggju eysturevropeisku limalondunum í ES er um at ganga undan, so koma tvey nýggj limalond í ES tann 1. januar 2008. Tá gerast Bulgaria og Rumenia partur av samveldinum, og hetta skuldi tryggjað, at arbeiðsmegi er til at fáa fatur á, sigur Vinnuhúsið.

### Stóran týdning

Men fram til 1. januar noyðist vinnan at brynja seg við toli, og lønarglíðingin og kostnaðarøkingin fær enn nakrar mánaðir at gera um seg, verður sagt.

Víst verður annars til eina norska kanning, sum í summar setti tøl á búskaparliga týdningin av útlendskari arbeiðsmegi. Kanningin, sum norska hagstovan hevur gjørt, staðfestir, at norska rentan hevði verið úti við eitt prosent hægri, um pólska arbeiðsmegin ikki var í landinum.

- Útlendska arbeiðsmegin hevur haft stóran týdning fyri norska búskapin. Pólendingarnir hava økt framleiðslukapasitetin og hava harvið minka um trýsti í búskapinum, segði Roger Bjørnstad granskari hjá Statistisk Sentralbyrå við norska blaðið Dagens Næringsliv.

Hann vísti á, at útrokningar teirra vístu, at miðal lønarstøðið í landinum hevði verið umleið 2% hægri, um pólska arbeiðsmegin ikki var tøk.

- Her er vert at hava í huga, at norska arbeiðsloysið ikki hevur verið á líka lágum støði sum tað føroyska. Í 2006 vóru í meðal 3,5 prosent arbeiðsleys, og seinasta hálva árið hevur talið ligið um 3 prosent. Í Føroyum er arbeiðsloysi nú niðri á 1,5 prosentum, sigur Vinnuhúsið á heimasíðu síni.